# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 18.09.2023 kl. 16.30

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Niels Olaf Eyvindsson
Eir J. Norðberg
Gunnhild Mortensen
Thorstein Thomsen
Martin í Nesi

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Ronni Hammer bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – játtað og kemur á skrá sum mál nr. 5. Hann byrjaði fundin fyri Janus Thomsen, ið kom inn á fundin undir viðgerðini av máli nr. 3

Thorstein Thomsen luttók ikki í viðgerðini av máli nr. 1

**1. 102-67-2023: Skriv frá Hvalbiar Sóknar Kapproðrarfelag.**

Umboð fyri felagið hava verið á fundi við bygdarráðið og greitt frá teirra støðu. Tey hava ein kapproðrarbát, men onki høli til bátin ella til venjingar. Nú hølini á Bíargarði, matr. nr. 339a eru lýst til sølu, heita tey á kommununa at keypa húsið.

**Trivnaðarnevndin 11.09.2023:**

Nevndin mælir til, at Hvalbiar Kommuna bjóðar uppá bygningin og at báðar ovaru hæddirnar verða umvældar og brúktar til ungdómshús.

**Fíggjarnevndin 18.09.2023:**

Samtykt varð einmælt at mæla til ikki at keypa bygningin, grundað á, at peningur ikki er játtaður ella tøkur til endamálið. Nevndin vísir til neystið í Nesi, ið kommunan eigur og brúkar.

**Avgerð:**

Atkvøtt varð um tilmælið hjá Fíggjarnevndini. Samtykt við trimum atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

**2. 102-66-2023: Umsókn um marknaumskipan matr. 527, 528a, 83, 84a,b,c,d,f,g og 395, Hvalba.**

Í sambandi við nýggja Hvalbiartunnilin, hevur Umhvørvisstovan sent kommununi umsóknir um marknaumskipanir og semjur til ummælis.

**Avgerð:**

Einmælt samtykt at viðmæla umsóknum um marknaumskipanir millum omanfyri nevndu matrikulnummur og semjur, ið gjørdar eru í hesum sambandi.

Janus Thomsen kom inn á fundin undir viðgerðini av máli nr. 3

3. **<u>102-68-2023: Innkomið tilboð uppá 6m vegbungu frá NORT</u>.**

Tilboðið frá NORT uppá 6m vegbungu til 40km/t er kr. 12.800,00 uttan MVG.

**Vega- og havnanevndin 14.09.2023:**

Meirilutin í nevndini, Gunnhild Mortensen og Martin i Nesi mæla til ikki at taka av tilboðnum frá NORT, grundað á, at bert eitt tilboð er innkomið.

**Fíggjarnevndin 18.09.2023:**

Nevndin tekur støðu á bygdarráðsfundinum.

**<u>Avgerð</u>:**

Atkvøtt varð fyrst um at taka av tilboðnum frá NORT. Tvær atkvøður vóru fyri og er málið sostatt fallið.

Síðani varð atkvøtt um uppskot frá Janus Thomsen at beina málið aftur í Vega- og havnanevnd-dina. Samtykt við seks atkvøðum fyri.

4. **<u>102-69-2023: Skriv viðvíkjandi gøtunavni</u>.**

Søkt verður um adressu til neyst á Bíargarði, Hvalba.

**Tekniska nevnd 14.09.2023:**

Nevndin mælir til at gera eina gøtu, sum fær navnið Bíargarður, har adressu tølini byrja frá matr. nr. 339b sum nr. 1 og so hækkar tað eystureftir.

**<u>Avgerð</u>:**

Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini og arbeiða víðari við hesum.

5. **<u>102-56-2023: Sp/f MP Bussar – sáttmáli um skúlabarnaflutning</u>.**

Bygdarráðið hevur á fundi tann 19.06.2023 samtykt at leingja verandi sáttmála við Sp/f MP Bussar í eitt ár.

**Trivnaðarnevndin 11.09.2023:**

Nevndin mælir til at taka støðu til hetta, eftir at Fíggjarnevndin hevur gjørt eina skrivliga avtalu.

**Fíggjarnevndin 18.09.2023:**

Samtykt varð einmælt at mæla til, at sáttmálin verður longdur fyri tíðarskeiðið 01.08.2023 til 01.08.2024.

**<u>Avgerð</u>:**

Samtykt við fimm atkvøðum fyri at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.00

Janus Thomsen Ronni Hammer Niels Olaf Eyvindsson

Eir J. Norðberg Martin í Nesi Gunnhild Mortensen Thorstein Thomsen